Meginfelag Áhugaleikara Føroya
Undir Pisuvarða 2 * FO-100 Tórshavn * Tel. 285624 * E-mail: maf@maf.fo * www.maf.fo

# Ljósskeið 3. – 5. februar 2023



Brennur tú fyri at arbeiða við ljósi á ein kreativan hátt? So tekna teg til ljósskeiðið, ið MáF skipar fyri **í Løkshøll 3. – 5. februar 2023**.

Lær tað nýggjasta innan ljóstøkni, tí tað er bert ein spurningur um tíð, áðrenn mann ikki longur fær brúkt tær góðu gomlu lampurnar. Neyðugt er tí at fyrireika seg til framtíðina, og dentur verður serliga lagdur á at læra um ta nýggjastu tøknini innan talgilda ljósstýring, LED lampur v.m.

Undirvíst verður fríggjakvøld frá kl. 19:00 og leygardag og sunnudag frá uml. kl. 09.00-18.00 báðar dagarnar. Íroknað skeiðið er undirvísing. Luttakararnir taka matpakka og drekka við sjálvi.

Lærari verður **Súni Joensen**.

Prísurin fyri skeiðið er **kr. 1.500,-** fyri hvønn luttakara. Avmarkað pláss.

Áhugaði kunnu fáa meiri kunning og tekna seg elektroniskt inni á heimasíðuni hjá MáF www.maf.fo ella við at fara inn á tiltakið ***Ljósskeið 2023*** á Facebook. Skráseting er fyrst galdandi, tá ið goldið er á konto í **Eik Banka: 9181-185 132 4 í seinasta lagi 10. januar 2023**.